## Holst flytur nú

Ein av fleiri lyklaspælarum á landsliðnum, sum ikki er í Portugal í hesi vikuni, er Christian Lamhauge Holst. Hann er skaddur í lærkrikanum, og hann er tískil heldur ikki førur fyri at venja og spæla í Lyngby. Christian Lamhauge Holst hevur skrivað sáttmála við Silkeborg. Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2009, men sambært bold.dk bendir nógv nú á, at tað verður nú beinanvegin, at Lamhauge maðurin fer at flyta úr Lyngby og til Jyllands. Í hvussu so er samráðast feløgini fyri at finna fram til eina loysn, so føroyski landsliðsspælarin nú beinanvegin kann flyta til Silkeborg.



## Senda dystin beinleiðis

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum hevur boðað frá, at fótbóltslandsdysturin í kvøld millum Portugal og Føroyar. Sjálvur dysturin byrjar klokkan 21, og klokkan 20.50 byrjar Sjónvarpið at senda frá vøllinum í Aveiro, har dysturin verður spældur. Føroysku spælararnir komu til Portugal fyrrapartin í gjár, og sagt verður úr leguni, at veðrið til fótbólt er av tí besta. 23 hitastig og samdrigið.

# Søguligt bragd av Íslandi

**Ísland skal spæla hálvfinalu ímóti Suður-Korea ella Spania**




*Alexander Peturson skorar*

OL
*Heri Simosen*
*heris@sosialurin.fo*

Alt Ísland er á hinum endanum. Alt landið hevur staðið stilt í hálvanannan tíma, meðan fjórðingsfinalan millum Ísland og Pólland var spæld. Spennandi dysturin endaði 32-30 til Ísland eftir hálvleiksstøðuna 19-14 til Ísland. Íslendingar vóru væl betri enn pøllendingar í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki stóð á gomlum nøglum, og var reppið, at pøllendingar javnaðu íslendsku leiðsluna. Men tað helt hjá Íslandi, sum hevur framt eitt av størstu brøgdunum í bæði íslendskari og olympiskari søgu. Bjørgvin Páll Gustavson í íslendska málinum stóð sín lívs dyst, og var tað eisini ógvuliga avgerandi fyri dystin. Íslendingar fingu nógvar útvísingar, men í fleiri førum skoraðu teir í undirtali. Danmark spælir ímóti Kroatia kl. 11. Vónandi fáa vit eina norðurlendska finalu! Bestu málskjúttar Íslands: Alexander Peturson 6, Snorri Guðjónson 5(1), Guðjón Valur Sigurðson 5, Logi Geirson 4, Ólafur Stefánson 4 (1), Arnór Atlason 3, Róbert Gunnarson 3.


# LÆRARASTARV
## í Kvívíkar skúla

**Tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 í Kvívíkar skúla.**

**Søkt verður eftir:**
- Einum lærara til avlopstímar og tímar til serligan tørv/ped. stuðulstímar.
  Starvið er umleið 17 tímar um vikuna.
  Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Tann, ið settur verður, skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiðinum
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- Vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og helst royndir viðvíkjandi næmingum við serligum tørvi. Tó kunnu fólk við royndum og/ella áhuga fyri ped. mennandi arbeiði eisini søkja.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið / Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi skjótast tilber.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á fartlf. 211504.

**Kvívíkar skúli** verður ein 3 flokkaður skúli við undirvísing í 1. – 7. árgangi. Komandi skúlaár verða 42 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er út og umbygdur og er sostatt ein nútímans skúli við sera góðum umstøðum, bæði fyri lærarar og næmingar. Lærararnir hava allir egna farteldu frá skúlanum.

**Kvívíkar skúli**
Frammi í Gerði 6 · FO-340 Kvívík · Tlf. 472400 · kvi@skulin.fo


# Danskir dreymurin brast

**Fyri fyrstu ferð noyðist Ulrik Wilbek heim aftur frá endaspæli uttan heiðursmerki**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Mikkel Hansen varð í løtum kastaður á vøllin sum skottrumfur, men heldur ikki hann megnaði at bróta sterku kroatisku verjuna*

Danmark megnaði ikki at senda Kroatia úr OL-endaspælinum, tá liðini hittust fyrrapartin í dag. Eftir 12-14 í hálvleikinum tapti danska liðið 24-26.

Danir høvdu frá byrjan trupulleikar móti sterku kroatunum, og serstakliga hevði Danmark ilt við at fáa nóg høgt tempo í bæði álopsspælið.

Tað gav at bíta frá byrjan, tá Kroatia alt fyri eitt vann seg 4-5 mál framum, og tó at danir stríddu seg aftur á javnt, so kostaði stóra takið.

Eitt lítið skifti eftir steðgin vann Danmark seg framum, men tað tóktist støðugt, sum høvdu teir reyðu ikki neyðuga yvirskotið. Tvær ferðir spældu teir í yvirtali, uttan at teir gjørdu sær dælt av hesum, og tá brotskast so eisini varð misnýtt, tá støðan var 20-22, skuldi hetta ikki vera dagurin hjá dønum.

Talan varð soleiðis um fyrsta endaspælið – OL, HM og EM – har Ulrik Wilbek ikki hevur heiðursmerki við sær heim aftur til Danmarkar.